

# MÓTTØKA



Í sambandi við at Frithleif Olsen, rakstrarleiðari av FJM Runavík, leggur frá sær, verður almenn móttøka fríggjadagin tann 29. februar 2008 kl. 15⁰⁰ - 17⁰⁰ í Sjókaféini í Runavík.

SKIPASMIÐJAN




# Prekvalifikatión

## Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll

**Útbjóðandi myndugleiki**
Tórshavnar kommuna
Vaglið
Postsmoga 32
FO-110 Tórshavn
www.torshavn.fo
torshavn@torshavn.fo

**Mannagongd fyri útbjóðing**
Innboðin lisitatión í høvuðsentreprisu í prekvalifikatión. Ætlandi verður heitt á 4–6 tilboðsgevar at bjóða.

Tilboðsgevar skulu geva tvey tilboð.

Tilboð 1 er at gera arbeiðið í trimum byggistigum:

byggistig: 01. mai 2008–15. apr. 2009
byggistig: 16. apr. 2009–31. des. 2010
byggistig: 04. jan. 2010–01. sep. 2011

Tilboð 2 er at gera arbeiðið í einum stigi:

byggistig: 01. mai 2008–31. des. 2009

Byggiharrin tilskilar sær rætt til frítt at velja millum tilboðini, eftir at tey eru innkomin, ella ikki at taka við nøkrum av tilboðunum.

**Lýsing av verkætlanini**
Verkætlanin umfatar um- og útbygging av Tórshavnar ítróttar- og samkomuhøll á Hálsi. Umbyggingin fevnir um øll rúm á vestaru- og eystaru síðu av høllini og inni í sjálvari høllini. Útbyggingin fevnir um uppíbygging í norðara og sunnara enda.

**Umbøn um luttøku**
Áhugaðir tilboðsgevar skulu senda umbøn til niðanfyristandandi adressu, har teir eftir umbøn eisini fáa vegleiðandi tíðarætlan og skitsuuppskot í sambandi við prekvalifikatiónina:

Tórshavnar kommuna, Vaglið, Postsmoga 32, FO-110 Tórshavn
Att.: Harald Bjørgvin, deildarleiðari

**Valkriteriir í sambandi við prekvalifikatiónina**
Valt verður út frá heildarmeting av valkriterium, sum eru:
- Tekniskur førleiki (teknisk starvsfólk)
- Miðaltal av starvsfólki (resursur)
- Viðkomandi royndir
- Fíggjarviðurskifti
- Góðsku-, trygdar- og umhvørvisskipanir

Umbønin við øllum kravdum tilfari og upplýsingum skal vera Tórshavnar kommunu í hendi í seinasta lagi 6. mars 2008 kl. 14.00.

**Áheitan um luttøku**
Áheitanir um at geva tilboð verða sendar saman við útbjóðingartilfarinum um miðjan mars 2008.

**Samtøk og felagsskapir**
Allir luttakarar í einum samtaki ella tílíkum felagsskapi skulu geva skrivliga váttan um felags hefting og ábyrging av sáttmálunum. Felagsskapir og samtøk skulu harafturat frammanundan tilnevna ein umboðsmann, sum við skjalprógvaðari fulltrú teknar bindandi avtalur við byggiharran vegna felagsskapin ella samtakið.

**Upplýsingar at nýta til prekvalifikatiónina**
Umsøkjarar skulu saman við eini umbøn um luttøku senda hesar upplýsingar:

- Upplýsingar um arbeiðstakarans egnu viðurskifti og neyðugar formalitetir til at kunna meta um kravdu minstuorku av búskaparligum, fíggjarligum og tekniskum slag.
- Upplýsingar um bygnaðin í fyritøkuni, herundir møguligt samband við móðurfelag.
- Stutta lýsing av, hvussu uppgávan verður loyst. Dentur verður lagdur á leiðslu og stýring, logistikk, byggitíð, trygging av tilfarsveitingum og góðskutrygging.
- Váttan ella trúnaðarváttan um, at arbeiðstakarin ikki hevur ógoldna gjaldskomna skuld til tað almenna.
- Avrit av viðkomandi vinnulívstrygging, upplýsing um eginpening og javna í roknskapi, tá ið søkt verður, saman við váttan av samlaða umsetninginum í miðal seinastu trý árini.
- Upplýsing um árliga miðaltalið av fólkum, sum starvast hjá fyritøkuni.
- Royndir við líknandi verkætlan.
- Lívsgongdarlýsing (CV) hjá lyklafólkum, ið verða sett á hesa uppgávu.
- Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir, umframt umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

Tórshavnar kommuna

SENDISTOVAN




Netbanki - tá tí og hugur er til tess



Gunnar Streymoy
Íløguráðgevi
Tlf. 516227
gst@skjernbank.dk

Við netbanka-loysnini hjá Skjern Bank kanst tú keypa og selja virðisbrøv tá tú hevur tíð og hug.

Set teg í samband við Gunnar Streymoy og fá meira at vita.

www.skjernbank.dk
SKJERN BANK

alin
-so eru tit við!